## Aycan vitjar føroyska dansigólvið

Komandi vikuskiftið hevur Aycan, ið er best umtókti danski bólkurin innan dance/trance-tónleik, tvær konsertir í Føroyum. Talan verður um tvær konsertir. Fyrra konsertin verður fríggjakvøldið í Eclipse. Dagin eftir spælir bólkurin, ið er mannaður av eggiligu songverskuni Mette av kilverskum uppruna umframt dananum 'Crapman', ið stendur fyri rútmunum, í Mentanarhúsinum í Fuglafirði, sum samstundis er karmur um eitt stórt tónleikatiltak, ið byin.fo skipar fyri.
Aycan, ið hevur sín uppruna úr jútlendska býnum Ålborg, er eitt kent tónlistarligt navn í Danmark og Týsklandi. Serliga er tað endurútgávan av legendariska lagnum 'Lambada', ið hevur gjørt, at Aycan nærum hevur verið fastur gestur á donsku hittlistunum seinastu tvey árini.



Jóannes Ejdesgaard, løgmaður:

# Stór stig tikin á javnaðarleið

**Í 1. maidags tiltakinum, sum Javnaðarflokkurin skipaði fyri í Grasagarði, vísti Jóannes Ejdesgaard, løgmaður, í røðu síni á, at úrslit so sanniiga eru rokkin hetta valskeiðið, sum javnaðarfólk kunnu fegnast um**

MAIDAGSHALD
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Jóannes Ejdesgaard, løgmaður, var høvuðstalari í Grasagarði á 1. maidagshaldinum há Javnaðarflokkinum.*
*Mynd: Leo Poulsen*

Í 1. maidagshaldinum, sum Javnaðarflokkurin skipaði fyri í Grasagarði seinnapartin í gjár, var løgmaður høvuðsrøðari.

Hann legði fyri við at greiða frá upprunanum til 1. maidags haldini, sum byrjaðu við einari arbeiðarakongress í París í 1889. Har varð samtykt, at 1. mai skuldi verða dagurin, har arbeiðararørslan um allan heim setti síni krøv fram.

Síðani hevur 1. mai hvørt ár í 118 ár verið hildin við røðum og sangi – við krøvum um batar og við fagnaði um vunnin framstig. Nógvir glæsiligir sigrar eru úrslit av stríðnum hjá arbeiðararørsluni, sum tæna arbeiðararørsluni til miklan sóma eisini her heima hjá okkum, segði løgmaður.

Hetta var orsøkin til, at Jóannes Ejdesgaard fyri tveimum árum síðani førdi fram, at klassiska stættastríðið var av og heitti á fakfelagsrørsluna um at seta sær nýggj mál.

Tí fegnist eg ómetaliga nógv um í dag, at Samtak, sum er ein samanrenning av Føroya Arbeiðarafelag, Havnar Arbeiðsmannafelag og Fiskimannafelagnum, vónandi við einari rødd tekur til orðanna í øllum samfelagsins viðurskiftum, segði løgmaður.

### Nógv komið av skafti

Jóannes Ejdesgaard segði, at síðani Javnaðarflokkurin fyri trimum árum síðani tók við landsins leiðslu, hevur gingið støðugt framá. Hann nevndi ein sterkan búskap, metlágt arbeiðsloyvi, stabil politisk viðurskifti og nógva optimismu í vinnuni.

Løgmaður vísti á, at tað altíð í einum samstarvi er so, at tú mást geva nakað fyri at fáa nakað. Og at tað bert finst eitt alternativ til at vera í samgondu – og tað er at vera í andstøðu.

Síðani nevndi Jóannes Ejdesgaard eina rúgvu av málum, ið eru gjøgnumførd hetta valskeiðið, og sum javnaðarfólk kunnu fegnast um. Fastan gerðarrætt, lóg um semjing, arbeiðsskaðatryggingarlóg, gott samskifti við fakfeløgini um eftirlønarskipan, hækking av samhaldsfasta og av fólkapensjónini, 337 nýggj starvsfólk innan almanna- og heilsuøkið, búskapargongdin vend rætta vegin og altjóðagerðin er sett á dagsskrá. Hesi vóru nøkur av punktunum, løgmaður nevndi.

So komið ikki og sigið, at einki sæst til javnaðarpolitikk, legði Jóannes Ejdesgaard dent á.

### Samhaldsfasti kostaði skattalætta

Einskiljingar pðlagdu ikki at vera gott latín í javnaðarflokkinum fyrr, men tíðin stendur ikki í stað. Løgmaður vísti á, at tað er ikki uppgávan hjá tí almenna at reka partafeløg. Tað gevur heldur onga meining av binda milliardir í hesi partafeløg. Peningurin eigur heldur at nýtast til at niðurgjalda skuld, so fíggjarligir møguleikar verða at styrkja um kjarnutænasturnar í landinum, helt løgmaður.

Hann kom eisini inn á skattalættan, sum ofta fær ákoyringar frá fakfeløgunum. Men hetta var ein prísur, sum Javnaðarflokkurin mátti gjalda fyri at fáa hækkað Samhaldsfasta. Og annars helt løgmaður ikki, at skattalættin bara var av tí ringa, tí loftið fyri toppskatti var hækkað úr 170 túsuns upp í 270 túsund við tí uppskotinum.

Eisini vísti Jóannes Ejdesgaard á, at 180 milliónir av teimum 236, sum eru lætnar í skattalætta, eru komnar inn í Samhaldsfasta í staðin.

Løgmaður nevndi eisini visjón 2015, ein visjón um einar Føroyar, har samhaldsfesti styrkir um tær tænastur, sum vit í Norðurlondum halda vera so sjálvsagdar.

Jóannes Ejdesgaard endaði við at ynskja, at Javnaðarflokkurin og fakfelagsrørslan halda góða samstarvi við líka og røkja tað eisini frameftir.



*Dánjal á Neystabø og Búi Dam undirhildu børnunum. Men tey vaksnu hugnaðu sær minst líka nógv sum tey smáu.*
*Mynd: Leo Poulsen*

Javnaðarflokkurin skipað

# Gaman

**Fitt av fólki var ta einu løtuna í Grasagarði, har Javnaðarflokkurin hevði skipað fyri 1. Maidags haldi. Jazztónleikur og undirhald fyri børnum settu sín dám á tiltakið**